# Føroyingar og forføringar

VIRGAR T. DALSGAARD
Ringsted



Ja, so skullu vit aftur til politiska glíming um tveir danskar fólkatingssessir, sum serliga tann eini flokkurin sigur seg hata og vilja beina fyri; - hóast júst teirra maður situr frálíka væl í tí eina hatisessinum, har hann rættiliga ger sær dælt við astronomiskari inntøku eftir føroyskum viðurskiftum!

Hetta vildu tey allarflestu rationelt hugsandi fólk hildið verið eitt groteskt paradoks, men tað rínir slett ikki við føroyskar republikanarar, sum hava ein heilt avskeplaðan og irrationellan miðaldarlogikk!

Tessvegna situr formaður tjóðveldismanna og skapar sær sín fjaðursára identitet við at hata sítt egna økonomiska eksistensgrundarlag. Hetta minnir ikki sørt um Jens Peter Bonde, danska superpamparin, sum hevur sitið í meira enn eina fjórðingsøld niðri í Bruxelles og hata sín EU-sess, sum hevur givið honum slakar 80 milliónir í stembaraskjáttuna higartil.

Tað er tankavekjandi, at sami J.P. Bonde er sera væl í øgn við júst republikanska føroyska fólkatingsumboðið, harra Høgna Hoydal! Hesar báðar Per Gynt-typurnar liva stutt sagt av sínum aversiónum, og teir eru blivnir bæði feitir og fregnir av at fraternisera við alt tað, sum teir hata! Hetta halda teir flestu eygleiðarar vera sjúkligt, óbúgvið og politiskt perverst.

Var nakar álvara ella nakað mansevni í teimum báðum hildu teir seg sjálvandi langt burtur frá teimum sessum, sum teir siga seg vanvirða og arbeiða miðvíst ímóti! Men teirra maktsjúka og teirra pengagrádigheit er nógvar ferðir størri og nógv meira týðandi enn teirra sonevndu "idealistisku" hugsjónir, sum bara eru til naivar heilavaskaðar veljarar, tølandi reyparøður og annars rættiliga hentar til óforpliktandi politiskt sunnudagsbrúk!

**Politisk pædofili**

Føroyski tjóðveldisflokkurin, sum nú genialt hevur blakað eitt "ð" burtur fyri at virka meira borðbærur ella stovureinur, hevur altíð verið eitt ønskriligt og óruddiligt reiður av skirvisligum tankagóðsi líka frá íslendskum tvangstankum til stalinistiskar dogmur; men fyrst og fremst av chauvinistiskari undirlutakenslu móti Danmark og danskarum, og hetta hevur hjá summum manifesterað seg sum eitt permanent danskarahat, meðan teir skiftivís hava kropið fyri og sleikt hvørjum norskum- ella íslendskum kúgandi koyrli. Í løtuni eru teir við at forlova seg við spikafeitum grønlendskum pamparum!

Øll teirra ideologi hevur verið bygd á paranoia! Teir hava jagstrað sakleysan ungdóm við nationalistiskum rakstrarrópum! Teir hava knarrað, teir hava grenjað og teir hava lúnað permanent í 60 ár. Tað hevur mesta partin av tíðini verið urkomiskt at lurta eftir teirra tvætli, men viðhvørt hevur verið ovboðið! Samstundis hava teir roynt at forført og heilavaskað føroyskar veljarar, serliga ungdómin til teirra perversa forfylgilsisvanvit!

Teir eru nevniliga sterkastir sum forførarar av teimum, sum ikki kenna fortíðina so væl. Tey meira tilkomnu lata seg ikki so lætt taka av fótum, men tað er gamalt, at nationalistiskir flokkar altíð duga best at øsa ungar veljarar upp, men tað knípir at behalda veljararnar, sum teir eldast ella búnast og fáa ábyrgdarkenslu, eitt nú børn, bil og bankalán, men fyrst og fremst vitan og horisont. Vitandi fólk lata seg ikki lættliga forføra!

Hesir samvitskuleysu menn eru reelt ikki føroyingar – teir eru bara for-føringar!

Vanligir føroyingar eru sáttligir hampamenn, sum ikki lata seg nerva av tí gagnligu og hollu symbiosu, sum er millum Føroyar og Danmark. Teir hava ikki undirlutakenslu. Tvørturímóti – teir síggja fyrimunirnar, meðan forføringarnir bara eru negativir og knarra ella gráta seg gjøgnum hvørja hending, eitt nú ta sinnsjúku episoduna við flagginum í summar á Rhodos, har alt tad gorrandi og grenjandi tjóðveldisliðið fór heilt uppfrá í teirra paranoidu skarvslopum móti Danmark.

**Desperatur høgnesiskur mønubrestur**

Tað allarfeskasta dømi um forførilsi av veljaranum er, at Høgni Hoydal er farin at prostituera seg við uppboðssølu av sínum politisku præferencum. Hann hevur boðað frá, at hann vil, um hann fær høvi til tað, styðja borgarliga politikaran, Anders Fogh sum statsministara. Men afturfyri krevur hann, at Anders Fogh skal hjálpa honum í Føroyum við loysingini.

Við øðrum orðum: Hann vil noyða Fogh at leggja seg út í føroyskan politikk og fremja tey vitleysu høgnatiltøk, sum føroyski veljarin higartil ikki hevur viljað vitað av! Føroyski veljarin skal við danskari hjálp noyðast til nakað, sum hann ikki hevur biðið um. Hetta kemur frá tí flokki, sum altíð hevur sagt, at danskir politikarar ikki mugu blanda seg upp í føroysk politisk viðurskifti.

Tað er óhugnaligt at síggja so samvitskuleysa opportunismu. Harra Hoydal er altso so princippleysur, at hann, sum annars plagar at fylkjast við tí mest ekstremu sektini í Fólkatinginum, Eindarlistanum, er nú fúsur til at bíta høvdið av allari skomm og fylkjast við sínum ideologiska mótstøðumanni, liberalistinum Fogh! Forførarin Hoydal er bíliga til sølu!

Vinmenninir hjá HH í Eindarlistanum eru eitt ótespuligt rudiment av gomlum maoistum, kommunistum og øðrum politiskum óruddi, og teir verða sjáldan tiknir meira álvorligt enn Høgni sjálvur, men teir mugu kortini stúrsa við, tá ið Hoydal knappliga snarar 180 stig í Fólkatinginum. Slík kúvending er avgjørt ikki vanlig á Fólkatingi, og sjálvt hjá eindarmonnum má vera eitt mark fyri politiskari kynismu.

Henda klossuta høgnesiska roynd til politiska maktdemonstratión úr Danmark móti føroyska veljaranum má vera tann mest kyniska machiavellisma, vit higartil hava sæð í føroyskum politikki.Tað vildi tí klætt teimum føroysku veljarunum, um teir hesu ferð góvu tjóðveldismonnum frammaná og vrakaðu tað republikanska umboðið, sum ger okkum øllum fyri skommum!

Vónandi fáa vit so upployst tann óappetitliga norðuratlantiska biddarabólkin, tí sjálvandi skullu føroyingar ikki fylkjast við grønlendskum pamparum sum Lars Emil Johansen, ið kanska er mest illa umtókti grønlendski politikarin í dag.

Konservativir føroyingar skullu fylkjast við donskum konservativum. Føroyskir javnaðarmenn skullu sum feðgarnir Dam altíð søgdu fylkjast við danska javnaðarflokkinum. Liberalir føroyingar fylkjast vid donskum liberalum og so framvegis. Harafturímóti mugu vit við andstygd venda okkum frá tí vitleysu høgnesisku konstruktiónini, sum norðuratlantiski grulvigarðurin er. Flestu danskarar meta norðuratlantisku dólgarnar sum kloddutar og neyðarsligar pengaavpressarar.

Setið tilkomin og vaksin fólk úr seriøsum flokkum á danska tingið, og gevið teimum republikansku óvitunum fríkorter til at beistast og grulva heima í Føroyum og ikki spæla politiskar rukkur í Danmark.

# Operatión loysing

JOHAN SAMUELSEN



Hóast ábyrgdarfólk í tjóðveldinum, enntá sjálvur sjefideologurin Sjúrður Skaale, alment siga, at fólk renna skríggjandi burtur, bara tey hoyra orðið loysing nevnt, so gevast tey ikki so, royna í staðin fyri at sminka við orðum sum smakka føroyingum betri tjóðarfrælsi, fullveldi o.s.fr. Men føroyski veljarin vil ikki vita av hesum loysingar/fullveldismøsninum – tað trúgva tey væl heldur ikki sjálvi uppá innast inni, tey sótu í fullveldissamgongu í heili 6 ár saman við Jenisi, og onki sum bar brá av loysingini, sá dagsins ljós hesi árini!– Hví skulu vit onnur so trúgva uppá hesa somu góðanáttsøgu, sum hevur rurað føroyska veljaran í svøvn, val eftir val nú í 100 ár? Vit liva í einum av heimsins bestu og frælsastu londum, onki eksperiment her – takk, sigur føroyski veljarin!

Men fullveldisfløgan er farin aftur at mala við fullari megi, sum um hetta skuldi verða ein stór nýggjheit hesaferð. Hóast hetta 100 ára heimsmet í loysingarsnakki, so verður lagt á aftur av nýggjum. Og hesaferð verður við stórum stavum boðað frá, at í komandi valskeiði verður loysingin veruleiki, hóast Skaale eisini her hevur boðað frá, at tað verður av ongum, tí ongin loysingarmeiriluti finst á Føroya løgtingi – so skilagóður og realistiskur er harra Skaale, men formaðurin Tjóðveldsins, harra Hoydal, hann framtúrar, hóast henda nakna veruleika við loysingarherrópinum, sum ein annar smartur sølumaður – maðurin hevur ikki lisið komunikatión (í DK!!) til fánýtis!

Og tá ikki eydnast at fáa føroyingar at leypa a bláman við tjóðveldinum, so verða aðrar leiðir royndar – og hon gongur, trúgv tí ella ei, sambært tjóðveldinum, igjøgnum danskar ráðharrastovur. Nú skal tað verða við hjálp frá donsku stjórnini, fyrst og fremst við hjálp frá danska forsætisráðharranum Anders Fog Rasmussen, at loysingin skal gerast veruleiki!

Hetta er í sjálvum sær ein stór andsøgn og tragikomiskt! Tjóðveldisflokkurin sum var stovnaður fyri at kvetta øll bond við Danmørkina, og luttók ikki á donskum fólkatingsvali mongu fyrstu árini eftir stovnanina í 1948, hann biður nú danskt stjórnarvald hjálpa til at taka avgerðir í Føroyum, at tryggja Føroyum eina grundlóg, og um føroyingar ynskja at taka loysingina, so vátta, at føroyski fólkaviljin verður fylgdur. Hetta er ússaligt og undirbrotligt út um alt mark, og umboðar eitt himmalrópandi uppgávulyndi, sum býður øllum føroyingum ímóti, hetta at biðja danir um hjálp at seta tjóðveldi á stovn, har teir eru oddviti í hesum "bardaga" fyri frælsi tjóðarinnar – makan til oyragass skal leingi leitast eftir. Og lat for guds skyld ongan uttan fyri landoddarnar hoyra tykkum við hasum skvaldurtosinum – láturligari kann tað snøgt sagt ikki verða! Bóðu t d. íslendingar danir um hjálp at loysa frá Danmark í 1944?

Hesin flokkurin góðtekur ikki føroyska avgerðarrættin, sum sjálvsagt liggur hjá føroyska fólkinum heima í Føroyum og bara har! Og als ikki á nakrari danskari ráðharrastovu. Allir aðrir flokkar á løgtingi skilja og virða henda rætt, men tjóðveldi má leita sær stuðul á sjálvum danatingi, og har selja seg fyri hægstbjóðandi, fyri at vinna føroyingum "tjóðarfrælsi" – at tit tora at taka hetta vakra orð uppá tunguna – tá øll vita, at Høgni og Co. best trívast við feitu donsku kjøtgrýturnar á Christiansborg undir liðini á Kupi Kleist og Lars Emil. Tað eru einir vinir Høgni hevur funnið sær á Borgini, umframt gomlu kommunistarnar – vanligi føroyingurin, sum hevur sæð filmin "Flýggjanin úr Grønlandi" vamlast og tekur frástøðu, men Høgni heldur væl til standa saman við grønlandsfeðgunum báðum – men gleðiligt, at tú stendur einsamallur hetta fólkatingsvalið teimum við lið!

# Til floksformennirnar: Skulu konufólk á ting og í landsstýrið?

ANNIKA W. JOENSEN



Havi lurtað eftir nøkrum av mongu valsendingunum í sambandi við fólkatingsvalið og undrast á, hvar konufólkini eru, sum flokkarnir so inniliga hava biðið stilla upp. Tað er møguligt, at tær eru slopnar eitt sindur nærri at mikrofonini, enn til undanfarin val, men nóg gott er tað framvegis ikki. Eg kundi hugsað mær, at floksformennirnir svaraðu hesum spurningi, áðrenn valstríðið til løgtingsvalið av álvara fer í gongd.

Eisini kundi eg ynskt, at floksformennirnir siga, hvussu kynjabýtið í einum komandi landsstýri fer at vera, stendur tað til teir. Eri spent at hoyra, um nakar floksformaður torir at svara, at teir vilja loyva konufólkum framat, um teir finna nakrar, sum eru egnaðar. Ella, at teir svara, at tað veldst um støðuna, tá samráðst verður. Eg ynski mær eitt bindandi svar, sum kann vegleiða veljaran, ið ynskir at konufólk eru við til at seta politisku dagskránna í Føroyum og harvið eru við til at býta út av stóru fíggjarlógarkøkuni.

Prógvið fyri okkum, at tit vilja hava konufólk á ting. Og verið við til at flyta okkum, ið búgva her á landi, inn í 21. øld kynjabýtinum í politikki viðvíkjandi.

Góð val til tykkum allar og okkum veljarum við.